


# Maersk Drilling setir 3.000 nýggj starvsfólk

Deil:

**Jan Müller**

15.07.2014 - 17:35

Oljan.fo

Tá Maersk Drilling fyri trimum árum síðani bílegði eina røð av boripallum og -skipum, byrjaði samstundis tann ovurstóra uppgávan at finna fleiri túsund fólk við teimum neyðugu førleikunum til pallarnar og skipini.

Málið hjá Maersk Drilling, sum A.P. Møller - Mærsk eigur, at er at koma upp á 30 borieindir, og tað merkir, at felagið skal finna 3.000 nýggj starvsfólk við teimum neyðugu førleikunum.

Í fyrsta umfari hevur Maersk Drilling bílagt fýra pallar og fýra skip. Hetta krevur 1.450 nýggj starvsfólk, og felagið er væl og veg at røkka málinum, sigur Claus V. Hemmingsen, forstjóri, við Ritzau Finans.

Tann 1. juli hevði felagið sett 596 fólk í arbeiði umborð á teimum nýggju boriskipunum og 311 onnur til teir nýggju pallarnar. Tað merkir, at felagið hevur fingið manning til teir fýra fyrstu nýbygningarnar, og sambært forstjóranum hevur felagið fingið fatur á fólkinum uttan at bjóða meiri løn, enn kappingarneytarnir lata.

-Vit ganga ikki á odda, tá tað snýr seg um lønina, tí vit hava ongan áhuga í lønarinflasjón. Hinvegin leggja vit stóran dent á viðurskiftini umborð, venjing og førleikamenning. Vit fara væl við fólkinum, og tað hevur givið okkum eitt gott umdømi, sum dregur fólk til okkara, sigur Claus V. Hemmingsen við Ritzau Finans.

Umsetningurin hjá Maersk Drilling var 1972 milliónir dollarar í fjør, og nettoúrslitið var 528 millónir dollarar